# Kristleif Zachariassen í Rex



*Maningin, sum spælir í Rex í kvøld, er Heðin Z. Davidsen, guitar, Arnold Ludvig, bass og Rógvi á Rógvu, trummur. Og so Sjálvandi Kristleif Zachariassen, sang og guitar*

**Ein heldur ókendur spíri kom undan kavi í singer/songwriter kappingini í fjør. Nú fløga er komin og ymsar framførslur eru á skránni, er Kristleif Zachariassen gerandisgestur í útvarpi og við sterku manning síni verður hann í kvøld í Rex í Havn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kristleif Zachariassen var sum so eitt óskrivað blað, tá hann vann Singer/songwriterkappingina í fjør. Tó so, hann hevði fleiri skrivað bløð liggjandi í skuffuni og komu hesir sangir á fløgu fyri stuttum og hava nakrir teirra síðani ljóðað ofta í útvarpi. Og hetta kundi merkt, at væl verður tikið ímóti tónleikinum hjá Kristleifi.

Fløgan og tónleikaslagið er eisini lættur og væl gloypiligur tónleikur. Løtt løg, har teksturin tó mangan hevur eitt og annað at siga lurtaranum, uttan tó at krevja ov mikið.

Talan er um fólksligan guitarfestan tónleik, ið er væl framførdur og væl swingandi oftast.

Sterka manningin í bólkinum, sum Kristleif hevur savnað afturat sær, ger ikki tónleikadygdina verri. Her er ikki gjørt ov nógv burturúr við at biða bæði »Per og Pól« koma og spæla og syngja hetta og hatta. Nei, ein sterkur og einfaldur bólkur - her hugsað um instrumentering. Trummur, bass og guitar. Og so skal tað vera, tí hetta hóskar væl til júst henda tónleikin, sum er festur í guitarframførslu og rødd og tekst.

Sjálvur sigur Kristleif um tekstirnar, at hann leggur stóran dent á at fáa teir at sita væl og at teir eru sera persónligir.

- Ein kennir seg ofta eitt sindur naknan, tá ein lesur teir aftur sjálvur. Men annars er upp til hvønn einstakan at fáa okkurt burturúr, og tað vísir seg eisini, at tað er sera ymikst, hvussu fólk lesa og uppliva tekstirnar, sigur Kristleif.

### Rex í kvøld

Í kvøld verður konsert í Rex í Havn, ein sonevnd útgávukonsert, har løg av útgávuni eru at hoyra. Kristleif og manningin fara á pall á leið klokkan 22. Maningin er Heðin Z. Davidsen, guitar, Arnold Ludvig, bass og Rógvi á Rógvu, trummur. Og so Sjálvandi Kristleif Zachariassen, sang og guitar.

### Prix

Kristleif og manning verður við til Prix Føroyar kappingarumfarið tann 5. mars. Har verður stórt sæð talan um sama slag av tónleiki, men ein munur verður, at allir tekstir tá eru á enskum.

Kristleif hevur nóg mikið av tilfari at taka av, og alt tilfarið til kappingina verður nýtt. Manningin og Kristleif eru farnir at venja til Prið Føroyar, men fyrst skal útgávukonsertin í Rex í kvøld leggjast afturum. So kunnu teir veruliga fara at hugsa um Prix, upplýsti Kristleif í gjár, tá hann var á veg til Havnar til næstu venjingina hjá bólkinum í samband við Prix Føroyar.

Móttøka



Í samband við at P/F Kjøtbúðin, v/O. Reinert, flytir í nýggj hølir á Akranesgøtu 7, hava vit móttøku fríggjadagin 11. februar 2005 frá kl. 15.00 - 18.00

P/F KJØTBÚÐIN

# Prix-upptakt í morgin

**Næsta innleiðandi umfarið í Prix Føroyum verður hildið leygarkvøldið, og í blaðnum í morgin ber til at lesa meira um bólkarnar í hesum umfari**

PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Prix Føroyar tónleikakappingin 2005 er farin av bakkastokki. Farna leygarkvøld var fyrsta innleiðandi umfarið í Prix Føroyum, og tveir bólkar vunnu sær pláss í hálvfinaluni í kappingini.

Leygarkvøldið verður annað av fýra innleiðandi umførum, og hesaferð fara seks bólkar at kappast um tey næstu tvey plássini í hálvfinaluni.

Bólkarnir, sum eru við hesaferð, eru bæði nýggir og meira royndir. Teir eru pH 5,5, All That Rain, Makrel, MMM, Róp og Side Effect.

Í blaðnum í morgin ber ti at lesa meira um hesar bólkar og um umfarið leygarkvøldið annars.

## Grýlur og DJ-show

**Stór konsert við Grýlum og DJ-show verður í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið**

KONSERT
*tíðindaskriv*



Leygarkvøldið tann 12 feb. verður eitt brak av einum tiltakið í Badmintonhøllini. Tá verður bæði konsert, DJ-show og grýlukapping.

PARADOX, Prixluttakarar sum onkur helt átti eitt sikkurt finalupláss, fara at spæla. Teir hava rættiliga prógvað, hvat ein góður tónleikabólkur anno 2005 er. Longu nú hava teir ein sera stóran fjepparaskarða rundanum seg, og tað sigst, at tveir stúgvandi fullir bussar komu úr Havn, bert fyri at lurtað eftir teimum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tann nógv umbiðni DJ-Switch hevur verið við til at seta nýggja dagsskrá í Føroyum innan hetta yrki, at vera DJ. Hjá DJ-Switch ella Pæturi Magnussen sum hann vanliga eitur, er tað ikki bert ein spurningur um at leggja nakrar fløgur á, man skal eisini duga »skratch« og miksa løgini saman. Við tí fær tónleikurin sostatt eitt persónligt og øðrvísi snið enn upprunaliga.

Elin í Stórustovu, eisini kend frá ZIP í ÚF, er ein av fremstu frásøgufólkunum vit hava í landinum, hon saman við DJ-Swicth fara at skipa fyri einari grýlu-kapping, har bestu grýlurnar fáa vinning.

Sum vant, so koyra bussar til og frá Badmintonhøllini í samband við tiltakið.